# Ragnar og Henrietta

**BORÐTENNIS Ragnar Egilsson og Henrietta Nielsen rukku ovasta tindinum í finaluni í blandaðum tvímansleiki**

Uni Holm Johannesen

Tað var ongantíð nakar ivi um, hvør fór at vinna finaluna í blandaðum tvímansleiki. Ragnar Egilsson, sum venur við danska Greve BTK, og Henrietta Nielsen úr Søhøjlandet løgdu bragdliga fyri. Rakul Mikkjalsdóttir og Kai Roest vóru aftan fyri mest sum allatíðina. Úrslitið var 3-0. Settúrslitini vóru 11-9, 11-3 og 11-5.

*uni@sosialurin.fo*






*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sann-førandi gullsigur

**BORÐTENNIS Petur Niclasen og Pætur Albinus vunnu sannførandi í finaluni í tvímansleiki hjá monnum**

Uni Holm Johannesen

Petur Niclasen og Pætur Albinus vunnu seg lætt og einfalt á odda 2-0. Tá fóru Hallur Thorsteinsson og Fróði F. Jensen undir seinastu royndina at svara aftur, og tað eydnaðist. Teir vunnu greitt í triðja settinum. Tað darvaði hinvegin ikki spælinum hjá Peturi og Pæturi, sum kveistraðu øll ivamálini til viks í fjórða settinum og tryggjaðu sær føroyameistaraheitið.

Settúrslitini vóru 11-7, 11-7, 3-11 og 11-8.

Ragnar Egilsson og Sigurð D. Carlsson fingu bronsuheiðursmerkini. Teir vunnu dystin um triðja plássið á feðgunum Vilmund Jacobsen og Ian Jacobsen.

# Hjalmar á tindinum





*Myndir: Álvur Haraldsen*

**JUDO Hjalmar Johannesen er føroyameistari í judo í vektflokkinum fyri teir, sum viga undir 73 kilo. Ragnar við Streym var bestur í opna bólkinum**

Uni Holm Johannesen

Hjalmar Johannesen vann á Jógvani Páll Kristiansen í finaluni. Teir togaðust eisini í finaluni í sama vektflokki, undir 73 kilo, í fjør, men tá vann Jógvan Páll. Hesa ferð hevði Hjalmar Johannesen munin.

Ragnar við Streym vann á Áka Davidsen í opna bólkinum, har allir íðkarar kunnu dystast, eisini teir, sum viga niðan fyri 73 kilo. Ragnar við Streym vann greitt. Teir høvdu bara dystast í ein hálvan minutt, tá Áki Davidsen gav skarvin yvir, tí Ragnar hevði gott tak á honum.

*uni@sosialurin.fo*